Góðu íverksetar, íleggjarar og øll tit, sum brenna fyri íverksetan.

Tað er mær ein stórur heiður at vera boðin at seta Íverksetaradagin 2023.

Eg havi fylgt íverksetaraumhvørvinum í mong ár, og tað hevur verið spennandi at eygleitt, hvussu íverksetarahugurin, -hegnið og fjølbroytnið av íverksetan hevur ment seg, og hvussu hugburðurin til íverksetan er broyttur og búnaður.

Hugtakið íverksetan fevnir víða. Handverksmeistarar, handilsfólk, fólk í skapandi vinnum, í ferðavinnu, í matframleiðslu, stovnarar av vitanarfyritøkum og so frameftir. Neyvan ber til at finna tveir íverksetar, ið eru heilt eins, men kortini hava tit tað týdningarmesta í felag.

Tit hava øll tað dirvið, sum skal til, fyri at bjóða tykkum fram í vinnulívinum. Tit hava dirvið til at seta tykkara pening og arbeiðsorku í veð fyri eina gevandi, men eisini heldur ótrygga tilveru. Í summum førum at fara frá føstum starvi við tryggari løn, til ikki heilt at vita, um pluss ella minus er á kontuni í morgin.

Tit hava eisini treystið í felag. Tað treystið, sum krevst til at herja á. Tí tað krevur seiggi, stirðil og styrki at halda á, tá brekkan gerst brøtt, sum hon jú javnan er hjá einum íverkseta.

Eg ivist ikki í, at tit hava fleiri ítøkiligar avbjóðingar í felag, óansæð um tit eru ófaklærd, handverkarar, akademikarar, ella hvørja bakgrund og førleikar tit hava í skjáttuni. Ting, sum ikki sýnast av nøkrum, fyrr enn tey brádliga taka alla orkuna og seinka menningina í fyritøkuni.

- Krøv og reglur, sum tit hava undirmett ella als ikki hava verið vitandi um.
- Mannagongdir, sum eru fløktari og tyngri, enn tit væntaðu.
- Fígging, sum er drúgvari at fáa upp á pláss, enn tit høvdu ímyndað tykkum. Og so frameftir.

Tíbetur ber til at hjálpa nakað upp á hesar avbjóðingar við góðum ráðum, einum góðum netverki og við útbúgvingum og skeiðum. Hesar eru nakrar av kjarnuuppgávunum í íverksetara- og vinnuframaskipanini, og ikki minst hjá Íverksetarahúsinum, sum skipar fyri hesum degi. Tey eru serfrøðingar at kveikja og ráðgeva, at finna røttu servitan og at skapa pallar fyri netverkan, sum hesin dagurin jú eisini er.

Allir íverksetar møta avbjóðingum, fyrr ella seinni. Men eg haldi kortini, at Føroyar munnu vera eitt av teimum bestu støðum at byrja eina fyritøku. Ja, Føroyar eru eitt fantastiskt land fyri íverksetar. So er tað sagt!

Her liggur væl fyri at menna nýggjar vørur og tænastur. Tað er fáa staðni, har tað er so skjótt at finna fólk við røttu vitanini - í vinnuni og í almennu skipanini. Serfrøðingar, sum eru góð í ráðum ella kunnu veita praktiska hjálp til ítøkiligar trupulleikar.

Her eru eisini allar hugsandi tænastur - smiðjur, sniðgevar, granskarar, fíggjarfólk, fólk við vitan innan handverk, heilsu, tøkni, sosialar miðar, KT, landbúnað, sjógv og sjómansskap – ja, nevn eitthvørt, og tú finnur onkran, ið kennir onkran, sum heilt vist kennir ein, ið er júst hin rætta ella rætti, at hjálpa.

Vit hava eitt stórt og vaksandi lið av íverksetum. Fólk, sum tora at seta alt í váða, fyri at byggja sína egnu fyritøku. Fólk, sum hava hugflog at skapa nýggjar vørur og tænastur, og við hesum loysa onkra avbjóðing ella nøkta ein tørv.

Hvørja ferð ein nýggj vøra kemur á marknaðin, og hvørja ferð ein nýggj tænasta verður tøk, so legst tað afturat vitanini í vinnuni. Legst afturat felags tilfeinginum av vitan og førleikum í samfelagnum, sum eisini kann brúkast til at hjálpa øðrum íverksetum.

Tá ið ein torir at fylgja sínum dreymi og skapa eina nýggja fyritøku, tá kveikist neistin hjá fleiri øðrum, og fleiri og fleiri tora at fylgja sínum dreymum. Tit íverksetar røkka so langt út um tykkum sjálvi. Tit eru sum enzym - kveikar - ið seta prosessir í gongd. Ja, tit hava eina beinleiðis ávirkan á hugsanarháttin og mentanina í samfelagnum.

Soleiðis upplivi eg tað, sum hendir í dag.

Tað kennist sum, at "psykiska undirstøðukervið" er vorðið størri. Tað er vorið INN at verða íverkseti, og tað er eitt bragd at taka stigið og seta sína egnu fyritøku í verk. Tann, sum tekur stigið at vinna sær livibreyð og byggja lívsgrundarlag sítt á egin hugskot og handaverk, fær viðurkenning og lógvabrestir.

Vit vita tó øll, at tað riggar ikki hvørja ferð. Og at mong eru, sum mugu gera skarvin yvir.
Men tilvitið um, at tað ikki riggar hvørja ferð, at tað eru treytirnar í vinnuni og í einum samfelag, sum er drivið av íverksetaramentan, veksur eisini. Vit skilja, at sjálvandi eydnast tað ikki altíð, men bragdið verður bara enn størri, tá ið íverksetar reisast aftur, busta dustið av sær, og herja á aftur.

Eg fegnist um, at fólk taka so væl undir við nýggju ætlanunum, sum íverksetar fara undir. Hetta sæst eitt nú sera væl í skipanini fyri hópfígging, sum nú hevur 4 ár á baki.
Breyðvirkið var fyrsta fyritøkan sum fekk ta fígging, sum tær báðar, Randi og Fríða, høvdu sett sær sum mál, og væl tað.

Úrslitið bleiv tað vælumtókta bakaríið, har fólk standa í langari bíðirøð at keypa súrdeigsbreyð, kanelsniglar og annað gott. Og so væl hevur gingið, at Randi og Fríða vórðu kosnar ársins íverksetar í fyrraárið.

Síðani er gingið slag í slag við hópfígging. Í miðal hava verkætlanirnar, sum bjóða seg fram á hesum portali, 73% møguleika at fáa ta fígging, sum tey hava sett sær fyri. Og í miðal hava hesar fyritøkur fingið omanfyri 128.000 kr. í kontantari fígging.

Tað er sjáldsama nógv, tá ið borið verður saman við hópfíggingarskipanirnar í grannalondunum. Hetta, haldi eg, vísir, at vit eru spent upp á íverksetan, og vilja hjálpa íverksetum at røkka á mál. Loyvdi mær í áðni at pástanda, at Føroyar teljast millum bestu lond fyri íverksetar. Men, tað merkir ikki, at føroyskir íverksetar ikki eisini hava tað trupult. Avbjóðingarnar kunnu vera bæði nógvar og stórar. Lítla samfelagið gevur fyrimunir í mun til at menna og royna, men tað er samstundis ein sera lítil marknaður.

Heimamarknaðurin er í nógvum førum alt ov lítil til at geva grundarlag fyri lønandi rakstri, og kappingin er beinhørð fyri tær fyritøkur, sum gera vørur og tænastur til størri marknaðir uttan fyri landoddarnar.

Tí er umráðandi at samfelagið, bæði almennir stovnar og vinnuframaskipanin hjálpa til, men eisini, at fólk og fyritøkur, sum kunnu, hjálpa hesum íverksetarum at vaksa, og hjálpa teimum við góðum sambondum út í heim.

Eg kann nevna eitt feskt gott dømi um samstarv um altjóða branding, nevniliga kt- og listastevnan TONIK, sum var í juni, og sum verður aftur næsta ár.

TONIK er eitt altjóða tiltak, sum vinnuframaskipanin í felag skipar fyri, til tess at skapa størri aljtóða uppmerksemi og virksemi fyri føroyska list og føroyskar kt-loysnir, og ikki minst fyri at menna møguleikarnar at skapa samspæl og samstarv millum kt og list.

Tiltøk sum TONIK eggja til nýskapan, innovajsón, á økjum, har vit hava góðar fortreytir og stórt vakstrarpotentiali, og tey geva íverksetum og íleggjarum høvi at hittast.

Tað eru fleiri onnur øki, har vit eisini hava framúr góðar fortreytir fyri at virka á bæði føroyska og altjóða marknaðinum. Tí gleði eg meg til um eina løtu at hoyra Leif Johannesen, menningarleiðara á GroAqua, ein fyritøka, sum mennir tekniskar loysnir til burðadygga aling, fortelja okkum um vegin til burðardyggan vøkstur á altjóða marknaðinum.

Og at hoyra Dávid á Rógvi Isaksen, stjóra í A4, ið veitir vørur til vinnuna í Føroyum, Íslandi og Grønlandi, greiða frá sínari ferð sum íverkseti.

Og at hoyra Ólav Gregersen greiða frá um Ocean Rainforest, sum alir og virkar tara, og er ein fyritøka, sum prógvar, at íløgur í útbúgving, gransking, royndir og menning eru væl útgivnar og at vit eisini á vitanarøkjum hava nógv at bjóða heiminum.

Og so gleði meg sjálvandi at heilsa uppá Ársins Íverkseta 2023. Spennandi verður hvør, ið fer at bera gullið av heiði 😉

Eg vil nýta høvið at bera Íverksetarahúsinum stórt rós fyri, at tit megna at seta íverksetan á breddan í síni litføgru og fjøltáttaðu heild.

Á íverksetaradegnum fagna vit bæði teimum næru hugskotunum, teimum smáu einstaklingavirkjunum, sum trívast við at tæna nærsamfelagnum, og eisini vakstrarfyritøkunum, sum vilja røkka globala marknaðinum.

Íverksetarahúsið hevur, saman við øðrum vinnuframapørtum, gjørt sítt til, at íverksetan er komin alt meira á pall og undir kastljós seinnu árini. Íverksetaradagurin og afturvendandi kappingar, sum Skúla FM og ungt virki, eru við til at skapa áhuga fyri íverksetan og at taða jørðildið fyri ungum íverksetaraspírum. Eins og skeið og tiltøk, sum tit og aðrir vinnuframapartar skipa fyri, geva teimum íblástur og vitan, sum vilja byrja fyritøkur.

Tað, sum vit skulu liva av í framtíðini, verður skapt av tykkum, sum í dag standa á gáttini at stovna tykkara egnu fyritøku. Tykkum, sum longu hava gjørt tað, og tykkum, sum skapa góðar karmar kring íverksetan.

Tí vil eg enda við at siga: Takk fyri tykkum! Við hesum orðum er Íverksetaradagurin 2023 settur.

Bjørt Samuelsen
løgtingsforkvinna

Røða hildin til setan av Íverksetanardegnum, Mentanarhúsið í Fuglafirð 20.oktobur 2023